**Skjal I**

Reglurnar um eigara- og avgerðarviðurskifti í føroyska fiskiflotanum eru ásettar í § 7 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum.

Vinnuligur fiskiskapur kann bert fara fram við fiskiførum, sum sambært ognarviðurskiftunum til eina og hvørja tíð eru heimahoyrandi í Føroyum og hava veiðiloyvi eftir § 5, stk. 3, fiskiloyvi eftir § 5, stk. 4, 2. pkt., ella hvørs eigarar hava fingið fiskiloyvi til fyribils ella avmarkað rættindi sambært § 5, stk. 4, 3. pkt.

Lógarreglurnar um eigara- og avgerðarviðurskifti eru ymiskar, um tað eru einkultpersónar ella feløg, sum eiga fiskifarið, t.e. standa sum skrásettir eigarar av ávísa fiskifarinum.

Eru tað einkultpersónar, skulu allir hava fast tilknýti til Føroyar, allir skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu tvey árini, og allir skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum. Somu treytir eru galdandi fyri einkultpersónar í felagsskapi, sum hefta persónligt, solidariskt og beinleiðis. Skrásetingin í fólkayvirlitinum og skattskyldan verður at rokna frá tí, at málsviðgerðin í slíkum máli byrjar. Hugtakið fast tilknýti er tengt at, um viðkomandi persónur má metast at hava høvuðsáhugamál síni í Føroyum. T.d. um hann búleikast í Føroyum, um hansara inntøkugrundarlag stavar úr Føroyum, og um húski hansara búleikast í Føroyum. Fasta tilknýtið kemur til sjóndar við ymsum gerðum, ið benda á, at ætlanin er at hava heimstað í Føroyum, t.d. við at seta búgv við familju og keypa hús ella onnur tiltøk, ið greitt geva ábending um, at ætlanin er at fáa fast tilknýti til Føroyar.

Er talan um felag, sum eigur fiskifarið, skal felagið vera partafelag, smápartafelag, lutafelag ella partsreiðarí og skal hava fast tilknýti til Føroyar. Er talan um partafelag ella smápartafelag, skulu partabrøvini vera navnapartabrøv. Í hesum sambandi skal verða upplýst, at av øllum fiskiførunum, sum eru størri enn 15 tons, eru bert 9, ið eru ogn hjá einkultpersónum. Øll hini eru ogn hjá antin einum smápartafelagi, partafelagi, lutafelagi ella partsreiðaríi. Tey 9 fiskiførini, sum eru ogn hjá einkultpersónum eru 7 í bólki 4A og 2 í bólki 4B.

Eigararnir av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum, herundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skulu hava fast tilknýti til Føroyar, skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu tvey árini, og skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum.

Føroyska nevndarumboðanin skal í minsta lagi vera 2/3 av nevndini og kemur undir somu treytir sum eigararnir viðvíkjandi tilknýti til Føroyar, skráseting í fólkayvirlitinum og skattskyldu í Føroyum. Lutar felagið út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað 2/3.

Um útlendingar eiga í føroyskum fiskifari, skal hetta góðkennast av landsstýrismanninum.

Fara broytingar fram í ognarviðurskiftunum, herundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skal hetta fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn broytingarnar fara fram, og landsstýrismaðurin skal góðkenna slíkar broytingar. Broytast ognarviðurskiftini, soleiðis at lutfallið 1/3 og 2/3 broytist, og útlendski parturin harvið gerst størri enn 1/3, fellur veiðiloyvið burtur.

Í avtalum partanna millum í slíkum málum kunnu vera treytir, har meting má gerast um kravið, ið lógin setir, er uppfylt. Serliga um 2/3 av avgerðarrættinum eru hjá eigarum, sum uppfylla treytirnar um fast tilknýti, bústað og skattskyldu. Hugsast kunnu støður, har eitt nú ásetingar í slíkum avtalum í praksis skúgva til viks virknaðin av ásetingini um býtið 2/3 og 1/3. Í slíkum førum má ein meting gerast, um treytir í slíkum avtalum endurspegla eigara- og avgerðarrættin í felagnum.

Er talan um fleiri feløg, sum eiga annað felag, sum so eigur fiskifar við veiði- og fiskiloyvi, er neyðugt at hyggja eftir øllum eigaraskaranum, og um hesin lýkur treytirnar um fast tilknýti, bústað og skattskyldu. Tað er ikki nóg mikið bert at hyggja eftir, um felagið, sum beinleiðis stendur sum eigari, lýkur treytirnar, men er neyðugt at leita aftur til teir likamligu persónarnar, sum eru við í slíkum felagsbygnaði (selskabskonstruktion), og um myndin er tann, at treytirnar um fast tilknýti, bústað og skattskyldu eru loknar.

Um stovnar, grunnar, feløg ella vinnufeløg eru luttakarar í partsreiðaríi ella í øðrum vinnufeløgum, má hvør einstakur luttakari lúka treytirnar fyri at vera mettur sum føroyskur eigari. Fyri at hava møguleika at fylgja við, hvør eigur skipini, sum hava veiði- og fiskiloyvi, gerst hetta best við, at partabrøvini eru navnapartabrøv og at áseta, at broytingar í ognarviðurskiftunum skulu fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn slíkar broytingar fara fram. Um lutfallið millum føroyingar og útlendingar broytist, soleiðis at útlendski parturin gerst størri enn 1/3, fellur veiðiloyvið burtur. Tað er tó heimilað at seta eina tíðarfreist fyri, nær treytirnar skulu vera loknar.

Landsstýrismanninum er heimilað at krevja upplýsingar og váttanir frá nevndarlimum, stjórn, eigarum, ráðgevum, fíggingarstovnum v.m., fyri at eftirkanna eigara- og avgerðar-viðurskiftini. Í hesum sambandi kann verða kravt at fáa góðkenda føroyska týðing av øllum skjølum. Útreiðslurnar til týðing ber felagið, hvørs eigaraviðurskifti verða kannað.

Til viðgerð av ognarviðurskiftunum eigur umsitingin at fáa hesi skjøl til vega:

- Stovningarsamtykt
- Viðtøkur fyri felagið
- Starvsreglugerð fyri nevndina
- Prógv fyri innføring í yvirlit yvir partaeigarar
- Partaeigarayvirlit
- Tekningarútskrift frá Skráseting Føroya
- Endaligan keypssáttmála
- Møguligan partaeigarasáttmála
- Onnur skjøl, sum hava týdning fyri ognarviðurskiftini og avgerðarrættin í felagnum, herundir I-ániavtalur
- Roknskaparupplýsingar
- Váttan um bústað í Føroyum
- Váttan um fulla skattskyldu í Føroyum
- Váttan um, at ongar aðrar avtalur viðvíkjandi eigara- og avgerðarviðurskiftunum enn tær, sum Fiskimálaráðið hevur fingið innlit í, eru gjørdar í hesum sambandi. Váttan skal fyriliggja frá nevndarlimum og stjórn.

Váttan um, at ongar aðrar avtalur eru enn tær, sum Fiski- og tilfeingismálaráðið hevur fingið innlit í, kann serliga verða kravd frá eigarum (partaeigarum/smápartaeigarum), advokati, fíggingarstovni og grannskoðara, men eisini aðrir ráðgevar kunnu hugsast at hava vitan um viðurskifti, sum Fiski- og tilfeingismálaráðið ynskir innlit í.

Viðmerkingarnar til lógartekstin siga, at til viðgerð av ognarviðurskiftunum eigur umsitingin at fáa til vega oman fyri nevndu skjøl. Lógin vísir tó greidliga til stk. 3, nr. 2 og 3, ið fevnir um bæði eigara- og avgerðarrætt. Fleiri av umbidnu skjølunum siga eisini nakað um avgerðarrættin í felagnum, og tí verða fleiri av skjølunum eisini nýtt av umsitingini til eftirkanning av avgerðarviðurskiftunum í mun til § 7 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Landsstýrismaðurin hevur heimild til at gera undantøk frá treytunum um ognarviðurskiftini, um talan er um royndarveiðu ella undirvísingar- og menningarætlanir. Talan kann eitt nú vera um at leiguskráseta skip til slík endamál. Undir vanligum umstøðum kann eitt leiguskrásett fiskifar ikki reka vinnuligan fiskiskap, tí tað lýkur ikki kravið um at vera heimahoyrandi í Føroyum til eina og hvørja tíð. Ásetingin kann nýtast til t.d. útlendingar, sum hava áhuga at royna eftir fiskasløgum ella á leiðum, sum føroyska fiskivinnan ikki hevur áhuga í ella kunnleika til, men sum hóast hetta má metast at fáa týdning fyri føroysku fiskivinnuna seinni. Ásetingin kann eisini verða nýtt, um parturin millum útlendskar eigarar og føroyskar eigarar er øðrvísi, enn lógarásett er, tá talan er um royndarveiðu ella undirvísingar- og menningarætlanir.

Undantak verður eisini veitt, um fiskifar til fiskiskap er fyri bráðfeingisóhappi, t.d. størri eldskaða ella størri maskinbreki. Í slíkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak, soleiðis at annað skip kann verða nýtt í fiskiskapinum, til upprunaliga skipið aftur er siglingarklárt.

Tá avgerð skal takast um loyvir til royndarveiðu, undirvísingar- ella menningarætlanir, skal tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni fyriliggja í málinum.

Skiftisreglur loyva, at virksemi kann halda fram eitt ávíst tíðarskeið, innan treytirnar skulu vera loknar. Skiftisreglurnar verða roknaðar frá gildiskomu lógarinnar.

Persónar og feløg, sum hava rikið fiskifør í 1996 og áðrenn, kunnu hóast ásetingarnar um eigara- og avgerðarviðurskiftini halda áfram við virksemi sínum, treytað av, at tey fiskifør, tey hava rikið, hava fingið veiðiloyvi frá landsstýrinum fyri árið 1996. Onki skip hevur slíkt undantak.

Reglurnar um nevndarumboðan og vinningsbýti vórðu ásettar við broytingini í lógini um vinnuligan fiskiskap, sum varð samtykt á Løgtingi 1. juni 2007 – løgtingsmál 120/2006. Til tess at tillaga samansetingina av nevndini, er feløgum álagt at fremja møguliga broyting í nevndarumboðanini á teirra fyrsta aðalfundi aftaná lógarbroytingina. Feløg, sum ikki lúka treytina um vinningsbýti, skulu fremja broytingar í ásetingunum um vinningsbýti innan 3 ár.

Eru treytirnar ikki loknar, kann landsstýrismaðurin nokta innflutningsloyvi, at veiðiloyvi/fiskiloyvi verður flutt til annað fiskifar, ella krevja, at viðurskiftini koma í rættlag innan ávísa tíðarfreist. Tað kann t.d. vera ein partaeigari, sum hevur selt síni partabrøv, og at treytirnar um eigaraviðurskiftini í § 7 harvið ikki eru loknar. Koma viðurskiftini ikki í rættlag innan setta freist, fellur veiðiloyvið burtur. Harafturat kann nevnast, at um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg, kann tann verða revsaður við bót, ið brýtur reglurnar í m.a. § 7 í lóg um vinnuligan fiskiskap.

Verður tikið samanum, kann sigast, at meginreglan fyri eigara- og avgerðarviðurskiftum í feløgum, sum eiga fiskiskip og hava loyvi at gagnnýta føroyska fiskatilfeingið, sostatt er, at føroyingar skulu eiga og avgera minst 2/3 av felagnum, sum stendur sum skrásettur eigari av skipinum. Hetta býtið skal eisini vera í nevndarumboðanini og í lutfallinum, hvussu møguligt

vinningsbýti verður útlutað eftir. Um útlendingar eiga í fiskifarinum, skal hetta verða góðkent av Fiski- og tilfeingismálaráðnum og broytingar á sama hátt. Til tess at hava tey neyðugu amboðini at arbeiða við, tá kannað verður eftir, um treytirnar um eigara- og avgerðarviðurskifti eru loknar, er Fiski- og tilfeingismálaráðnum heimilað at krevja upplýsingar og skjøl frá nevndarlimum, stjórn, eigarum, ráðgevum, fíggingarstovnum og øðrum viðkomandi – sí yvirlit við viðmerkingum niðanfyri.

Í útinningini av eftirkanningini biður Fiski- og tilfeingismálaráðið í fyrsta umfari um hesar upplýsingar:

1. stovningarsamtykt,
   (inniheldur upplýsingar um stovnarar, (smá)partapening, v.m., sí eisini kap. 2 í partafelags- og smápartafelagslógini)
2. viðtøkur fyri felagið,
   (inniheldur upplýsingar um (smá)partapening, atkvøðurætt, v.m., sí eisini § 4 í partafelags- og § 5 í smápartafelagslógini)
3. starvsreglugerð fyri nevndina,
4. prógv fyri innføring í yvirlit yvir partaeigarar,
   (í hesum yvirliti eru upplýsingar um partaeigarar, og hvussu stóran part av partapeninginum hvør stendur fyri)
5. partaeigarayvirlit,
   (í hesum yvirliti eru upplýsingar um partaeigararnar)
6. tekningarúrskrift frá Skráseting Føroya,
   (henda úrskrift vísir skrásettar upplýsingar um felagið, herundir nevndarumboðan, stødd á partapeningini tilsamans, tekningarreglur, v.m.)
7. endaligan keypssáttmála,
   (er felagið selt, er hetta skjalprógv fyri sølu og upplýsingar um keypara/-r)
8. lániavtalu(r),
   (vísir upplýsingar um lánitreytir v.m.)
9. møguligan partaeigarasáttmála,
   (vísir upplýsingar um teir partaeigarar, ið hava inngingið partaeigarasáttmálan, og kann seta aðrar treytir og møguleikar fyri partaeigararnar enn viðtøkurnar gera. Hetta hevur ofta serliga týdning í mun til avgerðarrættin í felagnum)
10. onnur skjøl, sum hava týdning fyri ognarviðurskiftini og/ella avgerðarrættin í felagnum,
11. váttan frá øllum partaeigarunum um, at ongar aðrar avtalur viðvíkjandi eigara- og avgerðarviðurskiftunum enn tær, sum Fiskimálaráðið hevur fingið innlit í, eru gjørdar í hesum sambandi,
    (kann hava týdning, um t.d. eingin partaeigarasáttmáli er gjørdur, v.m.)
12. váttan frá fólkayvirlitinum fyri hvønn einstakan partaeigara, nevndarformann og -limir um bústað í Føroyum seinastu 2 árini,
    (Fiski- og tilfeingismálaráðið biður um partaeigarayvirlit, við nøvnum, eftirnøvnum, bústaði og føðingardegi, og vendir sær síðani til Landsfólkayvirlitið. Hetta hevur týdning viðvíkjandi treytini um at vera skrásettur í fólkayvirlitinum seinastu tvey árini í § 7, stk. 2 í lóg um vinnuligan fiskiskap)
13. váttan frá TAKS fyri hvønn einstakan partaeigara, nevndarformann og -limir um fulla skattskyldu í Føroyum,
    (Fiski- og tilfeingismálaráðið biður um partaeigarayvirlit, við nøvnum, eftirnøvnum, bústaði og føðingardegi, og vendir sær síðani til TAKS. Hetta hevur týdning viðvíkjandi treytini um at vera fult skattskyldugur í Føroyum í § 7, stk. 2 í lóg um vinnuligan fiskiskap), og

14. roknskaparupplýsingar
    (inniheldur m.a. upplýsingar um eginpening, herundir partapening og møguliga eisini ábyrgdarpening umframt møguligt útgoldið vinningsbýti).

Í áheitanini verður gjørt vart við, at eru treytirnar í § 7 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap ikki til eina og hvørja tíð loknar, kann hetta hava við sær, at givin loyvi verða tikin aftur.

Verður komið fram á viðurskifti, sum tørvur er á at lýsa nærri, verður biðið um fleiri upplýsingar og/ella skjøl at greina møgulig ivamál.

Tá Fiski- og tilfeingismálaráðið veitir tilsøgn um innflutningsloyvi til fiskiskip og/ella at veiðiloyvi í tí sambandi verður flutt av einum skipi á eitt annað, verður gjørt vart við ásetingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap um eigara- og avgerðarviðurskiftini, og biðið verður um skjøl, so sum greitt er frá omanfyri. Støða verður síðani tikin til, um felagið lýkur treytirnar um eigara- og avgerðarviðurskiftini í lógini um vinnuligan fiskiskap. Málsviðgerðin fevnir m.a. um at eftirkanna innkomnu skjølini, krevja møgulig onnur neyðug skjøl, møguliga geva freist at fáa viðurskiftir í rættlag og endaliga eftirkanning.

Er talan um eitt felag, har viðurskiftini áður hava verið kannað og funnin at vera í samsvar við lógarásetingarnar, verður játtað felagnum innflutningsloyvi, og at veiðiloyvið kann verða flutt, samstundis sum felagið fær álagt at senda allar upplýsingarnar inn av nýggjum. Síðani verður nýggj eftirkanning gjørd av viðurskiftunum. Eru viðurskiftini broytt, soleiðis at felagið ikki longur lýkur treytirnar í lógini um vinnuligan fiskiskap, kann felagið fáa eina freist at fáa viðurskiftini í rættlag.